## DAGSINS MEINING

# NATO spøkir aftur

Mangur mundi hvøkka við, tá tað týsdagin ljóðaði gjøgnum hátalararnar, at Uttanlandsnevndin hjá Løgtinginum mælti løgmanni til ikki at geva NATO loyvi at fremja í verki ta sokallaðu SSSB-Far verkætlanina í Føroyum.

Ikki tí. Eitt slíkt tilmæli um ikki at fara undir verkætlanina var í samljóð við samtyktirnar á Løgtingið um uttanveltaðu støðu Føroya, og at hervald ikki skal vera á føroyskum land- og sjóøki. Men vit vita, at politiska støðan í Føroyum er broytt.

Fólkaflokkurin hevur í meiri enn 20 ár talað fyri NATO. Hann broytti áskoðan í 70 og 80-árunum til at vera ein NATO viðhaldsflokkur, og millum reglurnar hava fólk kunnað sæð, at flokkurin hevði einki ímóti NATO-støðunum og at Føroyar vóru eitt bumbumál.

Í klombrum kann annars viðmerkjast, at fyrrverandi oddamaðurin í Fólkaflokkinum, Hákun Djurhuus, legði uppskotið um hernaðarsamtyktina í 1960 fyri Løgtingið. Hann royndi tá at rópa líka hart sum tjóðveldismenn – m.a. Karsten Hoydal – og aðrir á vinstraveingi ímóti herstøðunum og ímóti táverandi løgmanni, P.M. Dam, tá hesin hevði fingið herstøðirnar meira ella minni kroystar niður yvir seg, tá hann tók við sum løgmaður.

Men vit hava lov at broyta meining, og vit hava eisini sæð, at Sambandsflokkurin er ikki so nógv ímóti NATO meira, eins og nýggi formaður Tjóðveldisflokksins hevur verið rættiliga lunkaður í hesum máli.

At fólk og flokkar broyta meining í dag er ikki so løgið. Heimurin er ein annar. Kalda kríggið er av og aðrir vandar lúra. Men fyri tað at Kalda kríggið er av, er ikki neyðugt at pilka við hernaðasamtyktirnar. Tann fyrsta varð eisini gjørd í 1940 – langt áðrenn Kalda kríggið var íkomið – og vilja føroyingar ikki framvegis vera uttanveltaðir?

Harafturat skal havast í huga, at vit kunnu ikki, um vit hava eina sjálvsvirðing sum ein tjóð, bara góðtaka NATO og NATO-støðirnar her á landi, sum er bygdar og settar upp, uttan at føroyingar vóru spurdir eftir. Bara løgmenninir vóru kunnaðir!!! Og ætla danir at góðtaka, at NATO byggir út ímóti einum føroyskum fólkavilja, verður tað neyvan til frama fyri samstarvið í ríkisfelagsskainum.

Eisini skulu vit minnast til, at eisini í hesum máli, duldu danskir og NATO-myndugleikar verkætlanina sum longst fyri føroyingum, so her er talan um ein moralskan og fólkaræðiligan trupulleika, sum vit ikki kunnu góðtaka.

At so formaðurin í Uttanlandsnevndini í tíðindaskrivinum hevur tikið munnin nakað fullan, og aðrir nevndarlimir – serliga Fólkaflokkurin – ikki tekur undir við endaligu orðingunum til løgmann um »ikki at geva loyvi«, men bíða til eitt aðalorðaskifti um málið, er eitt annað mál, har síðsta orðið neyvan er sagt enn.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sjúklingahotellið í Keypmannahavn

**Johan Dahl**
*Løgtingsmaður*
*Vágur 21. aug. 2002*



Havi lisið tær greinar, sum hava verið í Sosialinum seinastu dagarnar og ivist ikki í, at báðir teir involveraðu partarnir – sjúklingarnir og tey, sum arbeiða á hotellinum, eru einig í, at støðan, sum hon hevur verið seinastu tíðina, er ikki nøktandi og sera ótrygg fyri sjúklingarnir á hotellinum, og ger tað heldur ikki lætt at verða sjúkrarøktari á hotellinum.

### Var hetta leigumálið besta loysnin???

At leigan av hesum bústaðarblokki á Eysturbrúgv bleiv hildin at verða besta loysnin, tá hon var tikin, er ivaleyst heldur onki at ivast í – men sæð út frá tí, sum er komið fram um viðurskiftini aftaná, tá manglar, feilir og vanrøktlíknandi viðurskifti frá ánarans síðu av húsunum gera um seg, so kann ikki sigast annað enn, at hetta er ein stór feilíløga frá myndugleikans síðu.

Mín metan er, at leigarin t.e. Føroya Landsstýri má seta ein skjóttarbeiðandi bólk at gera eina niðurstøðu um bústaðarviðurskiftini og evt. manglar við leigumálinum og tilmæli um, hvat eigur at gerast frameftir fyri at gera viðurskiftini fyri sjúklingarnir nøktandi – bæði sosialt og mentalt.

Ongin ivið er um, at starvsfólkið ger sítt allarbesta fyri, at hvør einasti sjúklingur skal føla seg tryggan meðan viðkomandi er til sjúkraviðger í Danmark .

Vit mugu ikki gloyma, at her koma fólk í øllum aldursbólkum til viðgerðar og oftast eru tað sera álvarsamar sjúkur, sum verða viðgjørdar uttan fyri landaoddarnir – tí haldi eg eisini, at vit mugu geva hesum fólkum tey allarbestu kor at búleikast undir, meðan tey eru stødd heimanífrá.

Eitt sjúklingahotell er, um man so má siga, nr. 2 heim hjá mongum sjúklingum, tí oftani eru tað viðgerðir, sum taka langa tíð, eins og sjúklingar bíða í mánaðir og ár eftir t.d. at fáa skift organir á einum slíkum stað.

Tað at sita á 4. og 5. hædd í einum gomlum illa viðlíkahildnum bústaðarblokki á Eysturbrúgv man verða ein sera stórur belastningur fyri flestu føringar, sum eru vanir við náttúru, sjógv og reina luft, og tað er nakað, sum ikki fæst eyga á yvirhøvur í hesum blokki.

Mong av hesum fólkum eru heldur ikki før fyri at ganga – hvørki stuttar ella longri teinar, og tí skuldi umhvørvið fyri sjúklingahotellið verið eitt heilt annað enn tað er ídag.

Vit kunnu bert hyggja at tí húsinum, sum grønlendingar hava í Gentofte – tað er munur á facilitetum.

### 20 ára leigumál

Hotellið er leigað sum skilst 17-18 ár fram í tíðina og kann ein so spyrja seg, um ikki ein betri loysn hevði verið at keypt facilititir, sum vóru nøktandi???

Eisini kann spyrjast, um tað t. d. er neyðugt at leggja hotellið/íbúðirnar liggja mitt í Keypmannahavn?

Kundi t.d ikki verið funnin nøktandi hotellfacilitetir í 15-20 min. koyring frá Keypmannahavn, har fólk vóru í grønum umhvørvi – kanska eisini tætt við sjógvin, har bæði børn og eldri kundu nýtt nátturuna?

Hvussu er við verðandi leigusattmála? – er tað ikki møguligt um neyðugt. at verða loystur frá honum orsakað av umstøðunum og finna arða betri loysn??

### Keypið ella byggið annað hotell!

Ístaðin fyri at leiga fyri milliónir um árið, hví so ikki heldur hugsa langsiktað og antin keypa ella byggja ein facilitet, sum nøktar tørvin langt fram í tíðina, og sum inniheldur allar tær funktiónir, sum ein vil skulu verða á slíkum stað fyri bæði ung og eldri. Ein slík ætlan hevði eisini fingið góða fígging frá kreditfeløgum og hevði neyvan verið meira kostnaðarmikil fyri landið enn núverðandi leiguloysn.

Hetta mál má hava fyrsta prioritet, og vóni eg, at Trivnaðarmálaráðharrin fær hetta málið avklárað skjótast og loysir tað á skilabesta hátt.

# »Ríkisfelagsskapurin blómar« og »Sólin skínur á ríkisfelagsskapin«

**Abraham Mikladal**



Soleiðis málbóru ávikavist Anders Fogh Rasmussen og Jonathan Motzfeldt seg, nú teir vóru á vitjan í Føroyum

Orðini hava óivað fallið mongum frælslyntum føroyingi fyri brósti, og mong hava kent tað sum eina provokatión at málbera seg soleiðis.

Men er hetta ikki sannleikin? og er ikki Anders Fogh Rasmussen greiður yvir at boðskapur hansara sigur allan sannleikan, uttan at hann særir afturhaldskreftirnar í Føroyum?

Skal ein urt vaksa, búnast og blóma krevst, at sólin skínur á hana. Ikki fyrr enn hon blómar er hon komin í hæddina av lívi sínum og kann útinna tað, hon hevur sum aðalmál – at fræa. Hon letur fræ frá sær, og bert stutta tíð seinni følnar hon.

Hesi fræ fáa sítt frælsa lív, har tey vaksa upp – ofta langt haðani, tey komu og ofta undir heilt øðrum umstøðum.

Føroyar eru eitt av hesum fræum, ið skjótt verður latið leyst av urtini, ið kallast ríkisfelagsskapur. Ríkisfelagsskapurin stendur í blóma, og tess meira sólin skínur á hann, tess skjótari verður tað, at hann fræar – og vit fáa frælsi.

Tú, ið ynskir frælsi – gleð teg.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Latið okkum í felag fremja eina natúrliga økismenning

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður*
*og býráðslimur*



Vektingin av kommunalum íløgum eigur helst at skipast øðrvísið, samstundis sum vit skulu leggja fleiri landsalmennar fyritøkur úti um landið.

Í Sosialinum hósdagin 15. og leygardagin 17. aug. er samrøða við Heðin Mortensen býráðslim í Havnini og Høgna Hoydal landsstýrismann í kommunumálum. Talan er um væntandi barnaansing í høvuðsstaðnum.

Tann ið hevur fylgt gongdini seinastu 20-30 árini veit, at Tórshavnar Kommuna á flestu økjum hevur verið fíggjað óbeinleiðis úr landskassanum. Alt hetta hevur hent, meðan bæði landspolitikarar og flestu kommunupolitikarar hava hugt at og tikið til eftirtektar.

Hetta hevur elvt til, at meðalinntøkan liggur umleið 25% hægri har, enn í teimum størru kommunum úti um landið og nøgdsemið av hesum óbeinleiðis landskassastuðuli hevur bert verið versnandi.

Tað er so stutt síðani bæði Jógvan Arge og Annita á Fríðriksmørk hildu »órættvísina« upp ímóti ljósinum, »at Landssjúkrahúsið – harvið landskassin – ikki kundi bera sín part av barnaansingini í Tórshavnar kommunu«. – Eg mótmælti hesum sum løgtingsmaður.

Eg fegnist tí um, at Høgni Hoydal, landsstýrismaður, nú hevur sett seg ímóti hesum skilaleysa tosi, nú Heðin Mortensen reisir málið av nýggjum, men sjálvandi frá øðrum sjónarhorni.

### Búskaparráðið og effektiviteturin

Lesa vit ígjøgnum frágreiðingina hjá Búskaparráðnum, verður tosa um »ineffektivitet í privata vinnulívinum, tí føroyska framleiðslan fyri hvønn íbúgva ikki er á hædd við londini uttan um okkum«.

Búskaparráðið tosar so gott sum ikki um »ineffektivitet í almenna sektorinum«, men ger meiri burtur úr eini »miðsavnan av stovnum« og niðurger menningarátøk úti um landið, sum verða kallað »politisk« heldur enn handilslig. Sum sagt verður »Á henda hátt velja politikararnir millum økistrivnað og effktivitet, sum so aftur hevur ávirkan á effktivitetin á almennu arbeiðsplássunum.«

– Ja so grunt fer búskaparráðið fara til verks.

Búskaparráðið viðger ikki hvat hvør einstakur innan framleiðsluvirkini framleiða, men heldur hvat framleiðslan er fyri hvønn einasta føroying.

Hevði ikki verið rætt at spurt, hví vit framleiða ov lítið, er tað tí, at tey ið framleiða eru ov ineffektiv, ella kanska ov fá sammett við almenna sektorin. Her er miðastaðarøki væl umboðað. Er nøkur verulig kanning gjørd á hesum øki?

### Eru íløgurnar úti um landið allar skeivar

Ein kann altíð vera samdur við Heðini um, at íløgukarmurin var í stórum »eitt diktat« fra landsstýrinum, men spurningurin er um geografiska vektingin av loyvdum kommunalum íløgum ikki er dundrandi skeiv, av tí at ein triðingur verður lagdur niður í høvuðsstaðnum, har sum so gott sum alt landsalment arbeiði er frammanundan, og síðani í øllum tænastufyritøkunum, sum vaksa upp uttan um landsalmenna arbeiðið. – Hetta økir kostnaðarstøðið helst við millum 10 og 25 prosentum.

Eg trúgvi ikki at íløgukarmurin er ov lítil fyri Tórshavnar Kommunu, og síggja vit tær lands-almennu íløgurnar Heðin Mortensen leggur eftir, eru allar íløgurnar úti um landið skeivar. Hann nevnir tunnlar, vegir, ferjur flogvallir, (her rokni eg við hann hugsar um parkeringsøkið við Flogvøllin).

Lat meg siga Heðini og øllum teimum lokalu landspolitikarunum, sum gera seg inn á henda partin av íløgum, at hetta eru íløgur, sum ikki hava serligar rakstrarligar avleiðingar, men menna alt samfelagið, bæði vinnu, mentan og ungdómsarbeiði, meðan føroyska samfelagið í framtíðini verður kvørkra av íløgum við ov dýrum almennum rakstri, sum aftur tekur burtur av framleiðsluni, sum verður sambært Búskaparráðið roknað fyri hvønn føroying sær.

### Meiri pening út um landið

Latið okkum fáa økismenningina, sum nú er byrjað, framda, við at leggja fleiri almennar stovnar úti um landið. Hetta verður betri bæði fyri børn vaksin og aldrandi, og sum Heðin sjálvur sigur, hevði Havnin havt natúrligan vøkstur, var barnaansingin greidd. – Hetta gevur landinum eina breidd.

Omaná, høvdu størru kommunurnar og økini úti um landið havt størri inntøkur, og økini tí betri før fyri at lívbjarga sær við størri árligum inntøkum fyri hvønn borgara sær.

Eisini fari eg at heita á borgarstjórarnar í KSF, um at standa saman um hesa menning og skorða dyggari undir.

Latið okkum soleiðis fremja eina fyri alt landið gevandi økismenning.

*Teldupostur:*
keldu@post.olivant.fo

*Heimasíða:*
http://www.get.to/keldu

# Kórleiðaraseminar í Havn

**Í døgunum 13. – 15. september verður kórleiðaraseminar í sangstovu Tórshavnar Kommunuskúlans**

KÓRSANGUR
*Kórsamband Føroya*

Seinnu árini hevur Kórsamband Føroya víðkað sítt virksemið til at fevna um meira enn bert tað at taka sær av tónleikaliga partinum av árliga kórstevnuhaldinum og at skipa fyri kórsanginum á Tinghúsvøllinum ólavsøkudag. Soleiðis vóru 4 kórleiðaraskeið hildin í 2001 og tvey skeið í fyrru árshálvu í ár. Tað seinna endaði við roynd, har seks kórleiðarar fingu próvbræv við orðaðari meting av avrikinum. Tað var Mogens Dahl, universitetslektari og kór-og orkesturleiðari, sum hevði hesa skeiðfrálæru um hendur, og próvdómari var Steen Lindholm, urguleikari, dirigentur og musikkráðgevi statsins í tónleikamálum.

Luttakararnir hava verið sera væl nøgdir við hesa skeiðrøð, og nú móti endanum var ynski frammi um enn eina vitjan av Mogens Dahl, har tikið verður saman um skeiðgongdina hesi bæði árini, og har Mogens framhaldandi fer at gjøgnumganga kórtilfar og geva tekniskar leiðbeiningar.

Um nóg nógvir luttakarar tekna seg – helst skuldu teir ikki verið færri enn 10 í tali –, verður hetta kórleiðaraseminar í sangstovu Kommunuskúlans í vikuskiftinum 13. - 15. september. Skeiðið kostar 500 kr., og tilmelding fer fram í seinasta lagi mikudagin 4. sept. til Ólav Hátún, tlf. 31 18 19 ella 332 194 (teldupostur: olavasa@post.olivant.fo) ella til Astrid Jacobsen tlf. 42 44 39 eftir kl. 18.00.

### Kórnótasavn

Í sambandi við kórleiðaraskeiðini hevur kórsambandið skaffað til vega eitt fjølbroytt úrval av kórnótum við 40 eintøkum av hvørjum kórsangi. Landsmiðstøðin á Hoyvíksvegi í Havn hevur hesar kórnótar í varðveitslu, og ein láni-skipan verður nú fingin í lag, sum limakór kórsambandsins fáa nærri bod um.

### Kórleiðarasamtak

Í hinum Norðurlondum hava kórleiðarar skipa egnar felagsskapir sum t.d. Dansk Korlederforbund og felagið Svenska Körledare, sum við skeiðvirksemi og øðrum serligum tiltøkum taka sær av áhugamálum kórleiðaranna og soleiðis eru við til at hækka kórstøðið í landinum.

Um nóg góð undirtøka fæst til ætlaðu kórleiðarasamkomuna nú í september, verður fundur, har spurningurin verður viðgjørdur, um tað kann verða til gagn fyri kórsangin í Føroyum at stovna slíkan kórleiðarafelagsskap t.d. sum serdeild innan Kórsamband Føroya.

